KUNNINGARSKRIV

2017

Mynd: Thomas Vikre

Kunningarskriv 2017

Góðu borgarar í Sørvágs kommunu

Árið 2017 er av álvara farið at halla, og tað gevur okkum høvi at líta aftur um bak og í stuttum greiða tykkum borgarum frá virkseminum í kommununi farna ár saman við nøkrum orðum um ætlanir fyri næsta ár. Eisini fara vit at tríva í okkurt av tí, ið fór fram árið fyri.

Fólkatalið í kommununi er vaksandi og er í skrivandi stund komið upp um 1170, og er hetta fyrstu ferð nakrantíð, at fólkatalið er so høgt. Vit fegnast sjálvandi um hesa góðu gongd og ynskja, at hon heldur fram.

Fólkatalið í kommununi pr. 1. nov.					
Ár	2013	2014	2015	2016	2017
Fólk	1095	1076	1109	1118	1169

Á talvuni niðanfyri sæst, at okkara kommuna er á einum triðja plássi í landinum, tá ið umræður fólkavøkstur í prosentum. Hetta er av sonnum hugaligt.

Fólkatal í kommunum, fødd, deyð og flutt, 12-mánaðarskeiðið 1. nov. 2016 - 1. nov. 2017

	Fólkatal 1. nov. 2016	Fødd	Deyð	Burðar-avlop	Innlendis netto-flyting	Flutt úr Føroyum	Flutt til Føroya	Netto-flyting	Fólkatal 1. nov. 2017	Broytt í tali	Broytt í %
Alt landið	**49.696**	664	426	**238**	**0**	**1.166**	**1.590**	**424**	**50.358**	**662**	**1,3**
Fugloyar	46	0	2	-2	-5	0	0	-5	39	-7	-15,2
Viðareiðis	350	2	1	1	5	2	2	5	356	6	1,7
Hvannasunds	406	4	2	2	6	4	5	7	415	9	2,2
Klaksvíkar	5.051	64	53	11	-26	89	170	55	5.117	66	1,3
Kunoyar	137	1	1	0	3	0	1	4	141	4	2,9
Fuglafjarðar	1.515	20	9	11	6	32	34	8	1.534	19	1,3
Eystur	2.045	32	14	18	2	41	56	17	2.080	35	1,7
Nes	1.255	14	14	0	6	17	22	11	1.266	11	0,9
Runavíkar	3.918	59	31	28	-30	86	98	-18	3.928	10	0,3
Sjóvar	972	20	9	11	22	21	46	47	1.030	58	6,0
Eiðis	697	6	13	-7	3	10	30	23	713	16	2,3
Sunda	1.700	34	15	19	13	25	39	27	1.746	46	2,7
Tórshavnar	20.802	274	152	122	-28	638	791	125	21.049	247	1,2
Kvívíkar	586	10	8	2	-2	10	17	5	593	7	1,2
Vestmanna	1.198	18	15	3	17	23	31	25	1.226	28	2,3
Vága	2.023	29	16	13	-7	37	62	18	2.054	31	1,5
Sørvágs	1.118	22	9	13	16	21	43	38	1.169	51	4,6
Skopunar	453	9	1	8	-6	13	19	0	461	8	1,8
Sands	529	4	2	2	-5	11	7	-9	522	-7	-1,3
Skálavíkar	140	0	3	-3	10	5	0	5	142	2	1,4
Húsavíkar	117	1	1	0	0	0	0	0	117	0	0,0
Skúvoyar	42	0	0	0	0	0	0	0	42	0	0,0
Hvalbiar	696	9	15	-6	-16	6	14	-8	682	-14	-2,0
Tvøroyrar	1.720	15	17	-2	-6	40	48	2	1.720	0	0,0
Fámjins	84	1	1	0	-2	0	0	-2	82	-2	-2,4
Hovs	102	0	1	-1	-6	1	2	-5	96	-6	-5,9
Porkeris	292	4	3	1	19	5	6	20	313	21	7,2
Vágs	1.352	11	10	1	4	26	36	14	1.367	15	1,1
Sumbiar	350	1	8	-7	7	3	11	15	358	8	2,3

Kelda: Hagstova Føroya

Bygdaráðsval 2016

Týsdagin 8. november 2016 fóru vit aftur til valborðið at velja sjey umboð at stýra kommununi. 21 fólk á tveimum listum bjóðaðu seg fram. Úrslitið av bygdaráðsvalinum í fjør var, at fýra kvinnur vórðu nývaldar, og tríggir menn vórðu afturvaldir í nýggja kommunustýrið:

Listi A: Aimé Jacobsen 61 atkvøður, Jákup á Stongum 44 atkvøður, Jóhan á Ørg 54 atkvøður, Marna Jacobsen 53 atkvøður. Listi B: Anne Sophie Nordendal 38 atkvøður, Elsebeth Davidsen 39 atkvøður, Sune Jacobsen 83 atkvøður.

Á fyrsta sinni í søgu Sørvágs kommunu eru bæði borgarstjóri og varaborgarstjóri kvinnur. Á bygdaráðsfundi hin 15. november 2016 var Aimé vald sum borgarstjóri og Anne Sophie sum varaborgarstjóri. Nevndirnar eru hesar:

Fíggjarnevnd: Aimé Jacobsen, Jákup á Stongum og Jóhan á Ørg

Tekniska nevnd: Anne Sophie Nordendal, Jóhan á Ørg og Marna Jacobsen

Trivnaðarnevnd: Elsebeth Davidsen, Marna Jacobsen og Jákup á Stongum

Vinnunevnd: Marna Jacobsen, Anne Sophie Nordendal og Jóhan á Ørg

Havnanevnd: Sune Jacobsen, Elsebeth Davidsen og Jákup á Stongum

Við árslok í fjør tók so nýggja bygdaráðið við og fer nú undir sítt annað ár í hesum bygdaráðsskeiði. Eitthvørt stýri byggir á herðarnar á undanfarnum, og nýggja bygdaráðið hevur í høvuðsheitum tikið undir við fíggjarætlanini fyri 2017 og teimum raðfestingum, ið undanfarna bygdaráð gjørdi.

Fíggjarliga gongdin í 2017

Skattainntøkurnar hava higartil í ár roynst betur enn mett í fíggjarætlanini. Væntandi fáa vit eina góða millión í meirinntøku í persónsskatti, umframt nærum tvær milliónir í felagsskatti. Útreiðslurnar hava hildið nøkulunda á øllum økjum. Raksturin plagar at vera á leið tað, ið samtykt er. Tær eykajáttanir, ið gjørdust neyðugur at samtykkja síðst í árinum, eru fíggjaðar av tøkum peningi og við at flyta pening millum kontur.

Á myndini niðanfyri síggja vit kommunuskattin frá 2010 – 2017



Inntøkan fyri 2017 vísir 11 teir fyrstu mánaðirnar í árinum og mett, hvat inntøkan verður í desember.

P/F skattur 2010 – 2017



Fíggjarstøðan

Við árslok verður nettoskuldin hjá Sørvágs kommunu umleið 22 mió kr., sum er væl undir eina álíkning.

Nettoskuldin í mió. krónum (umleið)					
Ár	2013	2014	2015	2016	2017
	23.156.000	20.000.000	14.327.000	23.072.000	22.000.000

Sambært fíggjarætlanini fyri 2017 var ætlanin at gera íløgur innan m.a. hesi øki:

Almanna- og heilsumál: kr. 3.600.000

Undirvísing: kr. 6.300.000

Mentan og frítíð: kr. 3.280.000

Teknisk mál: kr. 5.700.000

Eitt sindur um okkurt av tí, ið kommunan varðar av:

Skúlin. Stórur partur av íløgujáttanini í 2017 fór til skúlan. Tann skúlin, vit kalĺa nýggja skúla, er ikki so nýggjur, sum vit gera hann til. Hann varð tikin í brúk á heysti 1989 og er sostatt nærum tretivu ár, og neyðugt var at gera eina veruliga dagføring av niðaru lonini.

Ovara hæddin er førd út ájavnt við niðaru hæddina, og vit hava fingið heilt onnur rúm, bæði í rúmd og vídd. Vit hava fingið stórar og rúmligar skúlastovur, ið kunnu brúkast til nógv endamál. Í niðaru hæddini hava vit fingið eina góða serstovu og køkin nútímansgjørdan. Sørvágs skúli er nú dagførdur og umvældur úr svimjihylinum og í sunnara enda á nýggju fimleikahøll. Tað næsta stigi í leiðini verður at taka støðu til, hvat vit gera við tað, ið eftir er at gera, tvs. fimleikahøllina og glaspartin millum hesa og svimjihøllina.

Skúlin í Gásadali hevur fingið nýggj hvít vindeygu. Ætlanin var, at loftið skuldi gerast í stand, men hetta var av ymsum orsøkum av ongum í ár.

Fótbóltsvøllurin á Dungasandi fór við einum stórum parti av íløguætlanini í ár í sambandi við at nýtt graslíki var lagt á. Gamli vøllurin varð lagdur á í 2005 og var sostatt 12 ára gamal. Skipað var fyri innbodnari licitation í januar, og tikið var av tilboði í februar. Í mai mánaða var liðugt at leggja á, og vøllurin varð góðkendur av FSF. So kundi fyrsti dysturin leikast.

Í óveðri fór ein av teimum seks 18-metrar ljósmastrunum, og seinni rendi ein bilur eina aðra um koll. Tí, og serliga fyri at lúka strongu UEFA-krøvini viðvíkjandi ljósum, verður neyðugt við nýggjum mastrum. J&K er farið undir arbeiðið at stoypa fundamentini, sum væntandi verða liðug heilt skjótt. Í fíggjarætlanini fyri 2018 er peningur settur av til fýra 24-metrar mastrar. Tær eru bílagdar og verða væntandi settar upp í januar.

Felagshúsið á Dungasandi. Kommunan hevur í ár eisini stuðlað 07 Vestur við peningi, so felagið fær gjørt loftið liðugt.

Á Stakka. Arbeitt hevur verið í fleiri ár við at finna eitt øki, har fólk kunnu savnast, og har lívd er. Á Stakka liggur í miðbygdini, og tað hevur eydnast okkum at keypa havan hjá grannanum norðanfyri. Bygdaráðið læt Westtech gera eitt uppskot.

Høvuðsendamálið við økinum er:

á Stakka

- Ætlað til hugna og samkomur fyri yngra og eldra ættarliðið.

Havin:

- Ætlaður børnum. Her er spælipláss, har atlit eisini eru tikin til samveru millum børn og foreldur
- Umframt bygning til vesi og goymslu.
- Økini verða bundin saman við gøtum, og stórur dentur er lagdur á, at økini bæði kunnu virka saman og hvør sær.

Hetta uppskotið var samtykt av bygdaráðnum, og byrjað var at gera aðru helvtina av økinum við spæliplássi, vesi og goymslu beinanvegin við ársbyrjan 2017. Westtech stóð eisini fyri hesum arbeiði. Spæliplássið var liðugt í summar til gleði fyri bæði børn og vaksin. Í fíggjarætlanini fyri 2018 er peningur settur av at gera hina helvtina lidna.

Nýggja træbryggjan varð handa Sørvágs kommunu í mars mánaða. Tað er Articon, sum hevur staðið fyri arbeiðinum.

Gamla træbryggjan hevði sæð sínar bestu dagar og stóð uppi nærum av gomlum vana. Hon var frá 1966 og hevði við sínum hálvthundrað árum á baki tænt fyri seg.

Lendingin í Bø var so illa farin, at neyðugt var at umvæla hana. Í uppganginum í jólamánaðinum í fjør fór sjógangurin so eisini við einum parti av dekkinum, sum var úr træi. Dekkið er umvælt og er nú úr betongi. Erik Heinesen hevur gjørt arbeiðið.

Í Mykines er tíverri enn neyðugt at draga oljutunnurnar úr fjøruni og niðan í bygdina. Sørvágs kommuna hevur fyri tíð síðani bílagt eitt akfar, og tað er í skrivandi stund júst komið til landið. Ein av fyrstu døgunum í nýggja árinum verður fundur við avvarðandi myndugleikar, har avrátt verður, hvussu oljuflutningurin skal skipast.

Grundøki. Sum nevnt omanfyri er fólkavøksturin í kommununi so stórur, at mann kann kanska undrast á, hvar hesi fólk búgva. Vit halda, at tað hevur stóran týdning, at kommunan

gongur undan, soleiðis at tørvurin á grundstykkjum altíð er nøktaður. Seinasta kommunala útstykkingin í Sørvági var gjørd í Billubønum uml. 2008, og vit eru í uppisetri við grundøkjum.

Nýggja bygdaráðið fór alt fyri eitt í eina tilgongd at fáa keypt øki til útstykking. Hetta eydnaðist okkum (sí nærri kunning seinni í skrivinum).

Fari eisini at nevna, at vit hava samskift við Bústaðir um bygging av leiguíbúðum, sum vit halda tørvur er á til tey, ið ikki vilja eiga, men leiga. Tað er enn ringt at siga, hvussu hetta samskiftið spælir av.

Spillivatnsviðurskifti. Hóast ásett var av landinum, at allar kloakkir skuldu leggjast út á streymasjógv í seinasta lagi í 2015, er heldur langt eftir á mál hjá okkum.

Kommunan hjá okkum fevnir um eitt stórt øki, og smáu bygdirnar eru nógv betur fyri, tá ið talan er um kloakkútlát.

Á heysti 2015 varð ein sundurgreinað spillivatnsskipan fyri Sørvág gjørd. Ætlanin fevnir serliga um økið frá Stórá og út á Bakka. Við hesum sum grundarlagi varð farið undir at leggja nýggjar leiðingar. Í 2016 var nýggj leiðing løgd í Skúlabrekkuna í samstarvi við SEV, eins og økið á Stakka partvís eisini varð lagt av nýggjum.

Í 2017 fór Poul Sigmund undir at leggja kloakkleiðing frá kommunuskrivstovuni til nýggjan felagstanga, og vóru húsini oman til brúnna bundin í. Rør er lagt tvørtur um Konshylsbrúnna og oman í brunn á Dungasandi. Eisini var byrjað at leggja nýggja leiðing frá brúnni og niðan til felagstanga eystan fyri hjá Suna og Vivi. Pumpubrunnurin úti á Liðakletti er nú bundin heim til brúnna. Tá ið hetta arbeiðið er liðugt, og pumpubrunnurin er settur til, verða stórt sæð allar kloakkirnar úr Geilini og heim í Stórá og niðan á Mýrar leiddar í høvuðskloakkina. Arbeiðið heldur áfram í 2018.

Kommunan hevur gjørt avtalu við kavara um at fáa annað av tveimum útlátum í Bø lagt út á streymasjógv. Hetta verður gjørt sum skjótast, tá ið veðrið loyvir tí.

Eins og í ár er ein millión sett av næsta ár at nærkast endamálinum at fáa spillivatnsviðurskiftini í rættlag.

Barnaansingin. Tað er sjálvsagt, at kommunan nøktar tørvin á barnaansingini. Vit kunnu fegnast um, at barnatalið í kommununi er støðugt vaksandi. Í vár fingu vit ein luksustrupulleika. Sum avleiðing av plásstroti í barnagarðinum var neyðugt at flyta elstu børnini úr Alvalon oman í Sýsluna. Nýggi leiðarin, ið var settur í starv 1. august, Claus A. Rasmussen, sigur, at Sýslan er

væl egnað til elstu barnagarðsbørnini, og at sami leistur verður brúktur aftur næsta ár. Hann er eisini fegin um, at skúlin í Bø kann brúkast til børnini av og á.

Kommunan hevur bert havt frítíðaransing til 1. og 2. flokk, men frá 1. januar 2018 er frítíðartilboðið í Sýsluni víðkað soleiðis, at børn í 3. flokki eisini kunnu vera har eftir skúlatíð.

Ungdómstilboð. Vit gleðast almikið um, at leiðslan í Alvalon beyð sær at skipa fyri einum tilboði til ung saman við kommununi. Bygdaráðið samtykti herfyri, at tað letur upp í Sýsluni 1. januar og verður opið trý kvøld um vikuna.

Bygdaráðið játtaði eisini fyrr í heyst umsókn frá felagnum **Bíggjarbata** og foreldrum, at børn og vaksin kunnu brúka skúlan í Bø til ymisk tiltøk gerandiskvøld eftir kl. 17.00.

Bygdaráðið hevur eisini samtykt, at **almenna svimjingin** skal verða ókeypis frá 1. januar.

Barnaverndartænastan í Vágum, ið virkar sambært lóg, er samstarv millum kommunurnar í oynni. Endamálið við barnaverndartænastuni er at tryggja, at børn, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, fáa neyðuga hjálp og umsorgan í rættari tíð, og at hjálpa teimum við at fáa ein tryggan uppvøkstur. Dentur verður lagdur á at finna loysnir, sum eru bestar fyri barnið. Lógin fevnir um ófødda barnið og øll børn og ung í aldrinum frá 0 til fylta 23. árið, ið eru stødd í Føroyum. Allir borgarar hava fráboðanarskyldu, og fakfólk hava skerpaða fráboðanarskyldu. Nærri kunning á: http://www.bvs.fo/

Barnaverndartænastan hevur eisini ábyrgd av **SSP-samstarvinum** í Vágum. SSP er ein tvørfaklig samstarvsskipan millum fakbólkar, ið virka millum børn og ung. Endamálið er at savna, samskipa og fremja felags fyriskipanir, ið skulu fyribyrgja kriminalitet og skaðandi atburð. Nærri kunning á: http://www.bvs.fo/ssp

Eldraøkið var lagt út til kommunurnar at umsita hin 1. januar 2015. Kommunurnar í oynni, ið eru saman um Heimatænastuna, skulu sambært lóg veita okkara gomlu og óhjálpnu eina góða og fjølbroytta tænastu. Um somu tíð var heimið á Sýnini yvirtikið, og tí tørvaði stórar ábøtur. Arbeiðið at umvæla heimið hevur ikki gingið eftir ætlan; tað er tíverri nógv seinkað. Men væntandi verður bróðurparturin klárur at taka í nýtslu heilt tíðliga næsta ár. Tá ið tær báðar ovaru hæddirnar eru lidnar, verður farið undir at umvæla kjallarahæddina, ið m.a. skal brúkast til endurvenjing og onnur heilsufremjandi tiltøk. Ætlanin er, at heimið, umframt at vera búfólkunum eitt gott heim í smærri eindum, eisini skal virka sum ein eldradepil við fleiri tilboðum til heimabúgvandi.

Yvirtøkan av heiminum á Sýnini fekk sjálvandi eisini fíggjarligar fylgjur fyri báðar kommunurnar. Landið veitti okkum eitt rentu- og avdráttarfrítt lán upp á 15.750 mió. kr. og eitt rentufrítt lán upp á 15.750 mió. kr. Avdráttartíðin av láninum frá landskassanum er bert 4 ár og 8 mánaðir. Vit byrjaðu at gjalda 1. januar 2015, og í august 2019 eru vit liðug at rinda okkara part. Tá fer hin kommunan at rinda sín part – tað, ið eftir er at gjalda.

Heimið verður umvælt eftir kostnaðarmeting, sum Landsverk gjørdi. Tá arbeiðið varð útboðið, vísti tað seg, at kostnaðurin var væl hægri, enn mett var frammanundan. Kommunurnar samdust um at hækka sín lut í fíggingini við 5 mió. kr. Okkara lutur í mun til meirútreiðsluna varð 1.8 mió. kr. Ætlanin er eisini at dagføra niðastu hædd innan, har, sum áður nevnt, endurvenjingar og heilsufremjandi tiltøk skulu vera. Vit meta, at tað er týdningarmikið at fáa alt liðugt. Tí er peningur aftur settur av á fíggjarætlanini fyri 2018 til hetta síðsta arbeiðið.

Frá 1. mars 2018 verða aftur **tveir læknar** í føstum starvi í Vága læknadømi. Heilsutrygd hevur sett Anders Vedelsbøl í starv sum kommunulækna. Seinastu tvey árini hevur hann verið kommunulæknaavloysari í Vága læknadømi.

Vitjanartænasta og sambinding. Sørvágs og Vága kommunur hava gjørt avtalu við Reyða Kross Føroya um at hava hesar fyriskipanir í oynni.

Um tú heldur, at tær ella onkrum øðrum, tú kennir, tørvar vitjan, ella tú hevur hug at gerast vitjanarvinur, ert tú vælkomin at seta teg í samband við fyrisitaran í **vitjanartænastuni**, Onnu S. Nordendal á tlf.nr. 332705/272142.

Endamálið við integratiónstiltakinum **sambinding/intertwining** er, at tilflytarar og føroyingar hittast, hugna sær saman og læra av hvørjum øðrum. Skipað verður fyri tiltøkum á bókasøvnunum nakrar ferðir um árið. Fyriskiparar í okkara kommunu eru Jóhan á Ørg og Liz Castillo.

Minnisvarðin. Allahalgannadag 2016 varð nýggjur minnisvarði yvir sjólatnar avdúkaður. Hann stendur beint við síðuna av nýggja kirkjuhúsinum. Minnisvarðin ímyndar eitt skip, sum er brotnað og søkkur og síðani verður sett saman aftur sum steinar. Krossurin ímyndar eina brotna mastur. Tað er Jóhan Petur á Stongum frá Sp/f West Tech, sum hevur sniðgivið minnisvarðan og Føroya Grótvirki í Skopun hevur gjørt hann. Grótlaðingina rundanum, sum er laðað sum ein alda, hevur Dia í Leynum gjørt.

Minningarhald teirra sjólatnu var hildið allahalgannadag í ár. Inga Poulsen Dam prestur talaði, og kransar vórðu lagdir.

Mynd: Magda Guttesen

Nykurin í Sørvágsvatni. Síðst í november var stórt hátíðarhald niðri á flúgvarabedingini, tá ið kommunan fekk nykin handaðan í gávu frá einum áhugabólki. Tað er Pól Skarðenni, ið hevur sniðgivið og gjørt nykin úr stáltráði, og børn úr skúlunum í Vágum hava fylt hann við smágróti. Umframt Pól vóru Sjúrður Poulsen og Michael Gram í áhugabólkinum. Hóast tað orðaskiftið, ið er komið fram í sosialu miðlunum um listarligu dygdina, so er kommunan sera takksom fyri gávuna og væl nøgd við verkið. Nykurin stendur sum eitt satt prýði í náttúruvøkrum umhvørvi.

Umhvørvisplássið (bingjuplássið). Bygdaráðið hevur samtykt, at tað skal vera **ókeypis** at sleppa av við burturkast frá húsarhaldinum á umhvørvisplássinum. Heitt verður á fólk um at skilja burturkastið væl, ikki at seta rusk uttanfyri plássið og um at leiga bingju frá IRF, um tey hava nógv burturkast t.d. í sambandi við bygging, umbygging ella annað. Eru ivamál, so hevur IRF ein góða og kunnandi heimasíðu: http://irf.fo/

Fyri at lætta um hjá borgarum okkara, hevur kommunan bílagt eina trýstbingju, sum er umhvørvisvinarligari og lættari atkomilig enn verandi bingjur.

Opið er soleiðis:

Týsdag: kl. 17-18, fríggjadag: kl. 17-19 og leygardag: kl. 16-18

Fari til seinast í hesum partinum til stuttleika at nevna tvey væl fyriskipað, væl vitjað og hugnalig **jólatiltøk**, ið hava verið í jólamánaðinum. Tað eru tiltøkini "Jól í Bø" og "Jól við vatnið". Stóra tøkk skulu eldsálirnar hava fyri at breiða hugna og seta jóladám á hesa annars myrku vetrartíð.

Atlantic Airways

Føroyska flogfelagið húsast eisini í okkara kommunu. Teirra virksemi avspeglast eisini í inntøkunum hjá kommununum í Vágum. Starvsfólkatalið liggur um 170 ársverk.

Samlaða framleiðslan hjá felagnum vaks við 6% í 2016 samanborið við 2015. Flogfør og tyrlur vóru samanlagt 8.009 tímar á flogi í 2016 samanborið við 7.534 tímar í 2015. Tímatalið innan leiguflúgving var at kalla óbroytt samanborið við árið fyri, meðan tímatalið innan rutuflúgving øktist við 2%. Framleiðslan hjá felagnum í 2017 verður hægri enn árið fyri.

Rutuflúgvingin stóð fyri 70% av samlaðu framleiðsluni í 2016, leiguflúgving 17% og tyrluflúgving 13%.

Í 2017 hevur felagið flogið rutuflúgving alt árið til Keypmannahavnar, Billund, Reykjavíkar, Bergen og Edinburgh. Til Edinburgh varð tó ikki flogið í tíðarskeiðnum frá 4. januar til 25. mars. Harumframt varð flogið til Aalborg, Barcelona, Mallorca, Kreta og Lissabon í summar.

Síðsta vetur vóru eisini nakrar beinleiðis fráferðir úr Vágum til Gran Canaria, umframt ein skíferð til Fraklands.

Á NORÐ-farleiðunum verður í 2018 á hásumri flogið tríggjar ferðir um vikuna til Bergen, tríggjar ferðir um vikuna til Reykjavíkar/Keflavíkar og tvær ferðir um vikuna til Edinburgh. Um veturin verður flogið tvær ferðir um vikuna til Bergen (tó tríggjar ferðir um vikuna jan-mars), tvær ferðir um vikuna til Reykjavíkar/Keflavíkar og tvær ferðir um vikuna til Edinburgh (undantikið jan-hálvan mars).

Til Keypmannahavnar verður vetrarhálvuna flogið aftur og fram tvær ferðir um dagin og upp í fýra ferðir um dagin á hásumri. Til Billunds verður flogið tvær ferðir um vikuna á vetri og upp í seks ferðir um vikuna á sumri.

Samlaða ferðafólkatalið við rutuflogførum felagsins øktist 6% í 2016 úr 267.126 í 2015 upp í 282.062 ferðafólk. Ferðafólkatalið fyri 2017 verður almannakunngjørt í sambandi við ársfrásøgn felagsins á vári 2018.

Atlantic Airways hevði 34 mió. kr. í avlopi fyri skatt í 2016 samanborið við 22 mió. kr. í avlopi fyri skatt í 2015.

Flotin telur eitt Airbus A320 flogfar (William), tvey Airbus A319 flogfør (Elinborg og Ingálvur) og tvær AW 139 tyrlur (Sámal og Ruth). A320 flogfarið tekur 168 ferðafólk, meðan A319 flogførini taka 144 ferðafólk. Øll Airbus flogførini eru útgjørd við framkomnari RNP AR-navigatiónsútgerð, ið hevur bøtt munandi um reglusemið á rutum felagsins.

Vága Floghavn

Nú 10 ár eru liðin síðani yvirtøkuna av flogvøllinum og stovnanina av P/F Vága Floghavn til at eiga og reka flogvøllin, kann staðfestast, at hóast eina lítla afturgongd tá fíggjarkreppan rakti í 2009 og 2010, so hevur tað verið ein støðugur vøkstur í virkseminum á flogvøllinum hesi 10 árini.



Størstu broytingarnar hendu, tá flogvøllurin var liðugt longdur við ársenda 2011, sum gav Atlantic Airways møguleika fyri at flúgva við Airbus 319 og Airbus 320 flogførum. Í 2017 er

aftur hend ein munandi broyting, tá flogfelagið SAS byrjaði at flúgva dagliga millum Vágar og Keypmannahavn. Ferðafólkatalið fór tí í okt. 2017 fyri fyrstu ferð upp um 300.000 ferðandi, og mett verður, at samlaða talið fyri 2017 kemur at liggja um 340.000 ferðafólk.

Boeing 737-800 **Mynd: Vága Floghavn**

Airbus 321 Neo **Mynd: Vága Floghavn**

Nýggja Farstøðin var liðugt bygd og tikin í nýtslu í juni 2014 og hevur sum heild roynst væl. Í farstøðini húsast Atlantic Airways, AVIS, 62N, Visit Vagar og Taks. Harumframt hevur Gist & Vist tvey matarstøð og Duty Free FAE hevur eisini nógv virksemi har. Ferðafólkini hava tikið sera væl ímóti nýggja handlinum, og sølan er støðugt vaksandi.

Nýggjur umsitingarbygningur varð eisini tikin í nýtslu í 2014. Í nýggja umsitingarbygninginum húsast umframt Vága Floghavn, eisini Føroya Politi, Posta og Atlantic Airways. Umframt hesar stovnar og umsitingina og havnarskrivstovu hjá Vága Floghavn, so hýsir bygningurin eisini brandstøðina, verkstaðin og kavaruddingaramboðini hjá Vága Floghavn. Somuleiðis verður øll flogfrakt avgreidd í frakthøllini í umsitingarbygninginum, og roynast umstøðurnar eisini her væl.

Vága Floghavn avgjørdi í 2016 at fara undir at víðka um parkeringsmøguleikarnar á flogvøllinum, og í okt. 2017 var parkeringsøkið liðugt. Talið av parkeringsplássum við flogvøllin er sostatt víðka frá uml. 320 til 850 parkeringspláss. Nógv verður gjørt burturúr at fáa betur skelting á flogvøllinum, og hetta arbeiðið verður eftir ætlan liðugt á vári 2018. Vága Floghavn hevur eisini gjørt íløgur í ymsa aðra útgerð og annað til tess at kunna avgreiða flogførini uppaftur betur og skjótari. Eitt nú er nýggj røntgenútgerð útvegað til bæði ferðafólk og flogfrakt, eins og talið av innskrivingardiskum er økt til tað dupulta. Og á tøkniliga økinum er samskiftis- og navigatiónsútgerð endurnýggjað á fleiri støðum.

Nýggja parkeringsøkið **Mynd: Fróði Poulsen**

Gamla farstøðin er nógv umbygd. Har húsast nú Gist & Vist, goymsla hjá Duty Free FAE og Atlantic Airways. Harumframt heldur EUR Express til í gomlu farstøðini, har teir hava skrivstovu og goymslu. Tornið er umvælt bæði í 2016 og 2017 og nýggj útgerð er sett upp. Starvsfólkini í torninum húsast nú aftur í ovastu hædd, og eru umstøðurnar og útsýnið nógv betri enn áður.

Vága Floghavn arbeiðir í løtuni við íløguætlan fyri 2018, har tað eisini er ætlanin at gera nakrar størri íløgur afturat.

Vága Floghavn vil annars nýta høvi til at takka Sørvágs Kommunu fyri sera gott samstarv hetta seinasta árið og vónar, at tað kann halda áfram.

Hiddenfjord

Í 2006 skrivaðu vit, at P/f Luna hevði sett smolt út á fjørðin, og at virksemið vónandi fór at verða størri árið eftir, tá laksurin fór at verða tikin.

Í tíðindaskrivinum frá 2008 varð skrivað, at felagið hevði keypt bláa bygningin á havnalagnum, og at ætlanin var at kryvja allan fiskin á kryvjivirkinum í Sørvági.

Nøgdirnar, sum eru viðgjørdar á virkinum, eru støðugt vaksandi, og í 2013 og 2014 vórðu tikin heili 10.000 tons.

Í 2014 varð farið undir at útbyggja virkið, og hevur hetta arbeiðið hildið fram í 2015.

Hiddenfjord hevur, tá ið árið 2017 er liðugt, kruvt uml. 12.000 tons. Hetta er søguliga nógv. Samstundis fegnast tey um, at starvsfólkatalið nærkast teimum 100. Ætlanir eru at vaksa um góðskingina av Hiddenfjord laksi, og tað kann væntast, at tørvurin á starvsfólki fer at vaksa støðugt.

Tey siga í skrivi til okkum, at tey vilja ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár og takka fyri sera gott samstarv í brátt farna ári.

Sp/f Westtech flytur av Varðagøta 1 niðan á Háls 23

Sp/f Westtech hevur seinastu 20 árini hildið til mitt í bygdini í Sørvági. Nú nýtt ættarlið tekur við, verður virksemið víðkað til eisini at fevna um bygging av tí, sum teknað verður. Í hesum sambandi hevur virkið saman við øðrum keypt bygningin á Hálsi 23 til endamálið. Teknistovan er flutt niðan við.

Í dag arbeiða 7 mans á virkinum, og við ársbyrjan 2018 verða vit 9 mans. Sp/f Westtech er góðkent sum læruplass. Felagið hevur ein lærling i timburlæru á fjórða ári, og sáttmáli er gjørdur við enn ein lærling at byrja fyrst í komandi ári.

Sp/f Westtech ynskir øllum eini gleðilig jól og alt tað besta í nýggja árinum.

EUR- Express

EUR-Express, sum var stovnað í 2006, hevur ment seg ár eftir ár við góðari tænastu innan sjó- og flogfrakt, og telist í dag millum fremstu flutningsfyritøkur í landinum.

Fyritøkan var eitt stutt tíðarskeið í Havn, men flutti so vestur í Vágar, og hevur húsast oman fyri flogvøllin síðani 2009.

EUR-Express heldur í dag til í gomlu farstøðini hjá Vága floghavn og mennist fyri hvørt ár.

Sp/f KJO

Flutningsvinnan hevur broytt seg nógv gjøgnum árini, og tað er umráðandi, at man tillagar seg tíðina, vit liva í.

Mesta arbeiðið hjá KJO í løtuni er laksaflutningur fyri Hiddenfjord, men annað virksemi er eisini millum annað útgrevstur, koyring við kranabili, har t.d. avtala er gjørd við Sandavágs

Timburhandil um flutning av størri materiali. KJO hevur eisini gjørt avtalu við EUR-Express og yvirtikið stóra bilin og flytur alt tað, ið vigar meir enn 3,5 tons.

Akstovan hevur leigað seg inn í høllina hjá Kristiani at sýna persónbilarnar her vesturi. Frá mars mánaða næsta ár verður ætlandi møguligt at sýna øll akfør í oynni – eisini tey størstu.

HA-bilar, ið átekur sær allar umvælingar av bilum, er eisini staðsett í høllini.

Kristian sigur víðari "*Vit eru altíð klárir at átaka okkum eina og hvørja uppgávu*" Tað er bara at seta seg í samband við okkum tlf. 210452 og 210952

Fyritøkan eigur í dag 8 bilar og 14 vognar.

Jim S Sp/f

Jim S hevur síðan felagið varð stovnað verið í støðugari menning og telist millum førandi gólvfeløg í landinum. Nógv virksemi hevur verið kring landið seinastu árini, og serliga væl merkist hetta innan byggivinnuna. Arbeiðsloysið er at kalla ikki til í Føroyum – hetta er gleðiligt, men merkir eisini, at trupulleiki er hjá flestu fyritøkum at fáa nokk av arbeiðsfólki. Soleiðis er eisini hjá Jim S, sum má ásanna, at neyðugt er at fara út um landoddarnar eftir styrki.

Í 2017 hava 12-15 fólk verið knýtt at Jim S, sum hevur uppgávur um mesta partin av oyggjalandinum. Uppgávurnar farna ár hava í høvuðsheitum verið betongslíping, epoxy- og polyurethanútleggjan, sum Jim S hevur lagt seg eftir, afturat vanligu gólvuppgávunum.

Framtíðin sær ljós út og vónandi verður 2018 eisini eitt ár við stórari framgongd fyri allar lokalar fyritøkur.

Jim S takkar hjartaliga fyri farna árið og ynskir øllum borgarum í Sørvágs Kommunu og kring landið eitt gleðiligt og eydnuberandi 2018.

Alt fær ein enda - eisini kappingarárið 2017.

Við nýggjum vølli og nýggjum húsi á Dungasandi eru rammurnar sera góðar fyri komandi kappingarár hjá 07.Vestur

Eisini kunnu vit í ár reypa okkum av at hava ársins ungdómsvenjara í felagnum, eftir at Jens Erik Rasmussen fekk hendan heiður.

Felagið, sum aftur í ár er í bestu deildini, hevur síðstu árini miðvíst førka seg fram á føroyska fótbóltspallinum og telist í dag millum best riknu feløg í Føroyum.

Málið fyri 2018 er aftur at vera verandi í bestu deildini og at menna ungdómsdeildirnar enn meira.

Vit síggja sera bjart upp á framtíðina og kempa víðari.

07 Vestur er eitt felag í stórari menning. Í ár hava vit havt umleið 450 íðkandi limir. Í 2018 verða 40 lið meldað til kappingar hjá Fótbóltssambandium. Vit, ið varða av 07 Vestur, eru í høvuðsheitum nøgd við kappingarárið, sum er farið afturum.

Nøkur av teimum málum, sum vit settu okkum, rukku vit. Fyri fyrstu ferð síðani stovnan í 2007 eydnaðist besta liðnum at verða verandi í bestu deildini, og tað eru vit sera glað og stolt um.

Sum heild hava liðini bæði hjá vaksnum og yngru deildunum fingið góð úrslit í ár.

Aftur í ár hava vit havt leikarar á fleiri av ungdómslandsliðunum.

Á kvinnusíðuni hevur eisini gingið væl í ár. Í 2018 melda vit 10 lið til á kvinnusíðuni.

Fyri at menna ungdómsdeildina enn meira er avgjørt at seta tveir høvuðsungdómsvenjarar í 2018. Hetta gera vit fyri at menna bæði gentur og dreingir.

07 Vestur ynskir øllum eini gleðilig jól og gott nýggjár og takkar øllum fyri gott samstarv í brátt farna ári.

SÍ

At Sørvágur er flogbóltsbygdin, vístu framúrskarandi úrslitini seinasta kappingár og ikki minni í nýggja kappingarárinum, har SÍ hevur heili 25 lið. Hesi eru í aldrinum frá 5 ár til 50 ár.

SÍ leggur størsta dentin á ungdómsarbeiði við løntum venjarum til øll ungdómsliðini. Seinasta kappingarár vísti, at tað gevur úrslit. Neyvan hevur nakað felag nakrantíð vunnið so nógv FM-heiti og Steypafinalur í einum kappingarári, sum SÍ kláraði í vár.

Í Steypafinalunum fyri yngri deildir í vár, var SÍ væl umboðað. Vit vóru við í heili 6 av 8 finalum. Dreingir 12 ár vunnu gull, og tað gjørdu D14 eisini. D16 og mansunglingar vunnu silvur. Á gentusíðuni gjørdust bæði Gentur 12 ár og Gentur 14 ár steypavinnarar.

Eisini í FM finaluumfarinum stóð ungdómurin hjá SÍ seg væl. Okkara ungu spældu seg í 8 av 8 FM-finalum. Her gjørdi SÍ eitt rættiligt hál, vunnu 6 føroyameistaraheiti og 2 silvur og gjørdust ivaleyst mest vinnandi felag í Føroyum nakrantíð. Á dreingasíðuni gjørdust D14, D16 og mansunglingar føroyameistarar og D12 vunnu silvur. Á gentusíðuni gjørdust G12, G14 og kvinnuunglingar føroyameistarar og G16 vunnu silvur.

Meistaradeild kvinnur hjá SÍ hava í eitt longri tíðarskeið havt eitt skifti av leikarum, og við hjálp frá ungum røskum gentum, endaðu tær á einum 4. plássi í landskappingini farna vetur. Harafturat spældu tær seg í hálvfinaluna í steypakappingi, har KÍF kom víðari.

Menninir eru somuleiðis í einum skifti, har sera evnaríkir ungir alvar taka yvir. Ungu menninir spældu seg bæði í Steypafinaluna og í FM-finaluna. Í steypakappingini bleiv tað til silvur, men í FM gekk enn betur og okkara ungu vunnu FM-finaluna og gjørdust Føroyameistarar.

Eisini vunnu 1. Deild menn hjá SÍ gull í FM, meðan 1. deild kvinnur vunnu bronsu.

Tá kappingarárið endaði, var ársins gallaveitsla, har bestu avrik vóru heiðrað. Úr SÍ vórðu 5 limir heiðraðir. Niels Erik Anderson var kosin ársins áleypari og Jóhan Petur á Stongum var kosin ársins verjuleikari. Inga Helena Henriksen var kosin ársins stjørnuskot hjá kvinnum og Jón Weihe Simonsen var kosin ársins stjørnuskot hjá monnum. Harafturat var Sonni Zachariasen valdur sum ársins dómari 2016-2017. Stórt til lukku til tykkum!

Nógvir leikarar hjá SÍ hava leikt á landsliðum. Á Oyggjaleikalandsliðnum hjá monnum var Oskar í Haraldstovu úttikin. Føroyar vunnu bronsu á Oyggjaleikunum. Á ungdómslandsliðum vóru eisini fleiri SÍ-arar við.

Hjá U-17 gentulandliðnum vóru Inga Helena Henriksen og Eva Gunn Niclasen úttiknar og spældu í 7 landakapping í Danmark. Gentulandsliðið vann á Grønlandi og tók sett frá bæði Noregi og Danmark.

Á U19 kvinnulandsliðum vóru 2 leikarar úr SÍ. Tær vóru Jórunn Elisdóttir Wang og Inga Helena Henriksen. U19 landsliðið vann á Íslandi og náddi fjórðingsfinaluna.

Á U17 dreinjgalandsliðnum átti SÍ bulin á liðnum. Ikki færri enn 6 av 11 leikarum komu úr SÍ. Teir vóru Ari í Haraldstovu Petersen, Ragnar Weihe, Hjørtur Joensen, Jón Weihe Simonsen, Oddur í Haraldstovu Petersen og Julian Vest Niclasen. Við ongum minni enn okkara Rajko Petrovic sum venjara, gjørdi U17 lansliðið tað bragd at vinna á Norra, umframt at teir smurdu Ísland av. Helst besta ungdómsúrslit á mannfólkasíðuni hjá Føroyum nakrantíð.

Á U19 manslandsliðnum átti SÍ helvtina av leikarunum, 6 av 12 leikarum. SÍ spælararnir, sum vóru úttiknir til U19 landsliðið, vóru allir okkara ungu leikarnir, sum eisini vóru á U17 landsliðnum. Landsliðið megnaði at vinna á Íslandi.

Eisini er vert at nevna, at SÍ-arin Kasper Lorentzen spælir á hægsta støði í Danmark, har hann spælir við meistaraliðnum Marienlyst í Odense. Undan jólum gjørdust Kasper og liðfelagar hansara steypavinnarar í donsku kappingini.

Hyggja vit at kappingini í ár, stendur væl til hjá SÍ. Við 25 liðum er neyvan nakað ár við fleiri leikarum.

Børnini, sum spæla kidsvolley, klára seg væl til tær ymisku kappingarnar, sum eru kring landið.

Landskappingin er hálvrunnin, og tað gongur sera væl hjá yngru deildunum - fleiri av teimum hava longu spælt seg í steypafinaluna, sum verður fyrst í komandi ári.

Bæði í Meistardeildini hjá kvinnum og monnum eru tað sera ungir leikarar, sum stór framtíð er í. Í FM liggja kvinnurnar á einum 5 plássi, men leikliga gera tær stór framstig. Menninir liggja á 4 plássi, men hava eisini gjørt stór framstig, sum kappingin er liðin.

1. deild kvinnur hjá SÍ liggja á odda í FM-stríðnum, og 1. deild menn hava vunnið allar sínar dystir í ár og eru tí eisini oddalið.

Í steypakappingini gjørdust SÍ-kvinnurar júst ov stuttar til eitt semifinalupláss.

Í steypakappingini hjá monnum hevur SÍ tvey lið, eitt við okkara ungu alvum og eitt við royndum spælarum. Vit kunnu siga eitt lið við teimum komandi og eitt við teimum farandi. Bæði liðini hava klárað seg væl og hava spælt seg í semifinaluna. At tað fall so út, at SÍ-liðini spæla móti hvørjum øðrum í semifinaluni merkir, at SÍ longu nú er tryggja eitt pláss í steypafinaluni, sum verður í februar.

Okkara framtíð liggur í ungdóminum, og úrslitini hesi seinastu árini boða frá góðum. MEN dreymurin hjá felagnum er og hevur altíð verið, at vit kunnu bjóða okkara leikarum teir bestu karmarnar innan fyri flogbóltin. Sum nú er, eru alt ov fáir venjingartímar, og umstøðurnar eru ikki tær bestu! Tá Eik-ligan spælir á útivølli, sæst ferð eftir ferð, at leikarar hava trupult við at spæla, og nógv bendir á, at spælið hevði verið enn betri, um vit høvdu betri umstøður at vant undir. Tí hevði tað verið sera ynskiligt við einari ítróttarhøll, bæði soleiðis, at vit kunnu fáa meir venjingar, og at venjingin kann verða meira skipað og løgd til hvønn einstakan leikara, samstundis sum tað er pláss fyri at fáa fleiri av okkara trúgvu áskoðarum til okkara heimadystir.

Sørvágur er flogbóltsbygdin fram um allar aðrar. Tí hevði verið ynskiligt, at vit høvdu ítróttarhøll at leika í.

Vit í SÍ vilja takka bæði leikarum, venjarum, hjálparum, stuðlum, foreldrum og ikki minst áskoðarum fyri dyggan stuðul í farna ári.

Eisini vilja vit takka fyri góðu undirtøkuna og hjálpina til SÍ-hugnan, sum vit høvdu herfyri. Dagurin eydnaðist sera væl og gav eitt gott íkast til raksturin hjá felagnum. Men eitt slíkt tiltak letur seg ikki gera uttan tykkum øll – stóra takk!

Við hesum skrivi vilja vit í SÍ nýta høvið at ynskja tykkum øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.

Í nevndini: Jørgen Niclasen, Maja Henriksen, Malja Mouritsen, Hanna Helena W. Simonsen, Jónley Poulsen, Helen Skaalum og Oddbjørg Magnussen.

Sørvágs Country- og Blues Festivalur.

Í 2012 var á fyrsta sinni skipað fyri Sørvágs Country- & Blues Festivali, tá nakrar eldsálir við Thordis Skaalum á odda fóru undir hetta tiltak. Sørvágs Country- & Bluesfestivalur hevur síðani verið eitt afturvendandi tiltak, og 14. juni - 16. juni 2018 verður aftur skipað fyri festivalinum á Dungasandi.

At skipa fyri tílíkum tiltaki hevur stóran fíggjarligan váða við sær, og harafturat skulu nógv praktisk viðurskifti avgreiðast. Uttan fíggjarliga hjálp og aðra hjálp frá stuðlum, Sørvágs kommunu og bygdafólki annars, hevði tað ikki borið til.

Komandi festivalur verður eins og undanfarin ár skipaður eftir sama leisti og í tøttum samstarvi við Sørvágs kommunu. Harafturat hevur festivalurin eisini samstarv við Summarfestivalin í Klaksvík og Bátafestivalin í Vestmanna. Hesi samstørv eru grundleggjandi og halda fram í komandi ári.

Byrjað verður hósdagin 14. juni við bassadegi fyri børnini og eldratiltaki, har góður matur, felagssangur, upplestur og tónleikur er á skránni. Setanin fer fram 15. juni við setanarrøðu og tónleiki.

Forsølan av atgongumerkjum byrjaði á www.country.fo fyrst í desember 2017. Atgongumerki til campingøkið og eldratiltakið fáast á Vága Kunningarstovu.

Fíggjarætlanin 2018

Sørvágs bygdaráð samtykti á bygdaráðsfundinum mikukvøldið hin 29. november 2017 fíggjarætlanina fyri 2018. Hon javnvigar við góðum 60 mió. kr.

Hesi eru høvuðstølini:

Rakstur:		**Inntøkur:**	
Rakstrarútreiðslur	43.699.000		
Avdráttir	3.383.000		
Rakstur + avdráttir	47.820.000	Inntøkur	56.829.000
Íløgur	12.950.000	Lán	3.203.000
Samlaðar útreiðslur	**60.032.000**	**Innt. og lán**	**60.032.000**

Skattaprosentið verður óbroytt 21,7%. Tá ið Sørvágs og Vága kommunur fóru at umbyggja heimið á Sýnini, var okkara skattaprosent hækka við 0,7% at fíggja afturgjaldingina av láninum frá landinum. Okkara partur av láninum verður, sum áður nevnt, liðugt afturgoldin á sumri 2019.

Kommunan raðfestir barnafamiljuna og ung.

Barnafrádrátturin hækkar við kr. 500,- til ialt kr. 6.000,- fyri hvørt barnið.

Ansingargjaldið lækkar munandi:

Frá kr. 2.300,- til kr. 1.900,- fyri vøggustovupláss	(hálv tíð frá 1.265 til kr. 1045,-)
Frá kr. 1.825,- til kr. 1.600,- fyri barnagarðspláss	(hálv tíð frá 1.004 til kr. 880,-)
Frá kr. 1.100,- til kr. 950,- fyri frítíðarpláss	(hálv tíð frá 605,- til kr. 523,-)

Stóra broytingin er avsláttarskipanin. Sum nú er, er systkinaavslátturin eftir yngsta barnið 25%. Frá 1. januar 2018 skal rindast fult gjald fyri yngsta barnið og hálvt gjald fyri tað næstyngsta. Hevur familjan fleiri enn tvey børn í ansingarskipanini, so verður einki rindað fyri hesi. Hetta merkir, at ein familja ongantíð rindar meir enn kr. 2.850,- í ansingargjaldi.

Kommunan hevur, sum áður nevnt, eisini samtykt, at tað verður skipað fyri einum tilboði fyri ung frá januar 2018. Dagstovnurin Alvalon fer saman við kommununi at standa fyri hesum.

Samsvarandi fíggjarætlanini fyri 2018 er ætlanin at gera íløgur fyri uml. 12.950 mió. kr. og eru m.a. hesar íløgur:

Almanna- og heilsumál:	1.800.000,-
Børn og ung:	150.000,-
Undirvísing:	300.000,-
Mentan og frítíð:	2.300.000,-
Teknisk mál:	7.200.000,-
Kommunal virki:	1.200.000,-

Størsti parturin av íløgujáttanini í 2018 fer til tekniska økið. Fólkatalið í kommununi er vaksandi, og okkum vantar grundøki. Høvuðsíløgan fer tí til byggibúning.

Kommunan hevur keypt eitt nærum 35000 fermetrar stórt øki til útstykkingar, har pláss verður fyri umleið 30 sethúsum og møguligari íbúðarbygging. Í fyrst umfari verður útstykkjað til uml. 18 grundstykki, sum við einum fríøki í miðjuni fara at hava útsýni út móti fjørðinum og oman í bygdina. Ferðslan til, frá og í økinum verður skipað við fasaduleysum høvuðsvegum. Tvs. at allar innkoyringar til grundøkini verða frá ikki-gjøgnumkoyrandi frávegum. Tað er Westtech, ið hevur gjørt uppskotið:



Í nógv ár hevur kommunan roynt at keypa fjøruna frá hagapørtunum, men hetta hevur ikki eydnast. Endamálið við at keypa fjøruna er, at kommunan sum byggimyndugleiki kann disponera yvir økinum. Vit eru av tí áskoðan, at støðan sum heild verður munandi einfaldari at umsita, um kommunan stendur sum eigari. Kommunan hevur givið hagapørtunum eitt tilboð og vónar at fáa eitt jaligt svar í seinasta lagi 1. mars 2018.

Ætlanin er at asfaltera ein part av havnaøkinum uttanfyri Vestmek. Eisini treingir bátahylurin til at verða tømdur. Peningur er settur av til hesi arbeiði.

Peningur er eisini settur av til nýggjar ljósmastrar við vøllin á Dungasandi og eina ventilatiónsskipan í svimjihøllini, sum fer at hava við sær, at tað verður heitari inni, og at orkunýtslan fer at minka.

Sum áður nevnt, er peningur eisini settur av til at fáa heimið á Sýnini og miðstaðarøkið á Stakka liðugt, og vit fara framhaldandi at dagføra spillivatnsskipanina.

Bygdaráðsfundir 2018.

Bygdaráðið hevur ásett føstu bygdaráðsfundirnar fyri 2018. Fundirnir verða kl. 18:00 í fundarhølinum á kommunuskrivstovuni niðanfyri nevndu dagar.

Mikukvøldið 31. januar

Hóskvøldið 22. februar

Hóskvøldið 22. mars

Hóskvøldið 26. apríl

Mikukvøldið 30. mai

Mikukvøldið 27. juni

Mikukvøldið 05. september

Mikukvøldið 26. september

Mikukvøldið 31. oktober

Mikukvøldið 07. november

Mikukvøldið 28. november

Mikukvøldið 12. desember

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 14 dagar fyri fundin.

Eykafundir ella broytingar í skránni verða lýstir í svørtu talvur á kommunuskrivstovuni og á heimasíðuni hjá Sørvágs kommunu.

At enda

2017 er av álvara farið at halla, og brátt skriva vit 2018.

Vit vita sjálvandi ikki, hvussu 2018 fer at vignast, men vit fara við góðum treysti inn í tað nýggja árið og taka við teim uppgávum og avbjóðingum, sum tað nú einaferð fer at geva okkum.

Vit, sum eru vald í bygdaráðið, vilja altíð og eftir bestu sannføring stjórna allari kommununi so væl, sum til ber. Endamálið er, at í okkara kommunu skal vera gott bæði at búgva og virka.

Til seinast fari eg vegna bygdaráðið og starvsfólk okkara at ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

Sørvági, hin 21. desember 2017

Vinarliga

Sørvágs kommuna

Aimé Jacobsen, borgarstjóri

Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlanina fyri 2018

		Rakstrarætlan		Løguætlan
Túsund kr.		Útreiðslur	Inntøkur	
§ 1.	**Kommulan fyrisiting**	**3.604**	**-**	**-**
	11. Felagsútreiðslur	3.604	-	-
§2.	**Almanna- og heilsumál**	**16.124**	**-**	**1.800**
	20. Heilsumál	1.234	-	-
	21. Almannamál	14.890	-	1.800
§ 3.	**Børn og ung**	**8.113**	**-**	**150**
	26. Barnaansing	8.113	-	150
§ 4.	**Undirvísing**	**4.037**	**-**	**300**
	23. Útbúgving og gransking	4.037	-	300
§ 5.	**Mentan og frítíð**	**2.254**	**-**	**2.300**
	23. Útbúgving og gransking	452	-	-
	24. mentan	1.802	-	2.300
§ 6.	**Teknisk mál**	**4.636**	**-**	**7.200**
	11. Felagsútreiðslur	1.043	-	700
	22. Íbúðarmál	-	-	5.500
	24. Mentan	408	-	-
	30. Umhvørvi	767	-	1.000
	38. Samferðsla og samskifti	2.418	-	-
§ 7.	**Kommunal virki**	**3.952**	**-**	**1.200**
	30. Umhvørvi	2.271	-	-
	31. Tilbúgving	471	-	-
	38. Samferðsla og samskifti	1.210	-	1.200
	Tilsamans	**42.719**	**-**	**12.950**
§20.	22. Íbúðarmál	700	-	-
§20.	50. Rentur	280	-	-
§20.	52. Skattir og avgjøld	-	56.829	-
	Tilsamans	43.699	56.829	12.950
	Yvirskot		13.130	
	Rakstrar-, løgu og útlansætlan RLÙ		**180**	
§25.	62. Afturgjald av skuld	3.383	-	-
	Bruttokassaúrslit	**3.383**	**180**	**-3.203**
	Fígging			
§25.	64. Útvegan av gjaldsføri		3.203	
	Fígging í alt		3.203	3.203
	Samanlagt	**3.383**	**3.383**	**-**

Høvuðsyvirlit yvir játtanarroknskapin fyri 2016

		Játtan Rakstur og útlán			Roknskapur Rakstur og útlán		
	Túsund kr.	Útreiðslur	Innt.	Løgur	útreiðslur	innt.	Løgur
§1.	**Kommunal fyrisiting**	**3.340**			**3.253**		
	11. Felagsútreiðslur	3.340	-		3.253	-	
§2.	**Almanna- og heilsumál**	**16.488**		**1.800**	**16.484**		**7.101**
	20. Heilsumál	1.449	-	-	1.427	-	
	21. Almannamál	15.039	-	1.800	15.057	-	7.101
§3.	**Børn og ung**	**6.695**			**7.278**		
	26. Barnaansing	6.695	-		7.278	-	-
§4.	**Undirvísing**	**3.955**		**5.610**	**4.096**		**1.818**
	23. Útbúgving og gransking	3.955	-	5.610	4.096	-	1.818
§5.	**Mentan og frítíð**	**2.266**	**-**	**2.323**	**2.590**	**-**	**2.284**
	23. Útbúgving og gransking	453	-	-	622	-	-
	24. Mentan	1.813	-	2.323	1.969	-	2.284
§6.	**Teknisk mál**	**4.163**		**5.185**	**3.902**		**5.010**
	11. Felagsútreiðslur	593	-	2.185	595	-	2.484
	22. Íbúðarmál	-	-	400	-	-	117
	24. Mentan	234	-	-	138	-	-
	30. Umhvørvi	867	-	600	831	-	477
	38. Samferðsla og samskifti	2.469	-	2.000	2.337	-	1.931
§7.	**Kommunal virki**	**3.253**		**5.334**	**3.556**		**4.359**
	30. Umhvørvi	2.248	-	-	2.286	-	-
	31. Tilbúgving	466	-	-	765	-	-
	38. Samferðsla og samskifti	539	-	5.334	505	-	4.359
§20.	22. Íbúðarmál	700	-	-	664	-	-
§20.	50. Rentur	860	-50	0	616	-22	-
§20.	52. Skattir og avgjøld	0	-49.869	0	-	-54.253	-
	Tilsamans	**41.720**	**-49.919**	**20252**	**42.440**	**-54.275**	**20.571**
	Rakstrarúrslit	**0**	**8.199**	**0**	**-**	**11.835**	**-**
Rakstrar-, løgu og útlánsøtlan RLÙ			**-12.053**			**-8.736**	
§25.	60. Broyt. Í "virið" og "skuld v.m."	0	7.973	0	-4.462	1.810	-
	Nettokassaúrslit	**0**	**-4.080**	**-4080**	**-4.462**	**-6.926**	**-2.464**
§25.	62. Afturgjald av skuld	2.920	-	-	3.269		
	Bruttokassaúrslit	**2.920**	**-4.080**	**7.000**	**-1.193**	**-6.926**	**-5.733**
	Fígging						
§25.	64. Útvegan av gjaldføri		7.000	-7.000		5.733	5.733
	Fígging í alt:		**7.000**	**7.000**		**5733**	
	Samanlagt	**2.920**	**2.920**		**-1.193**	**-1.193**	